# Øgiligur gravgangur eftir Jósef

**Einastu írestandi atgongumerki til stóra sangleikin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið« eru til eykasýning leygardagin kl. 16., meðan allar aðrar sýningar eru útseldar. Eftir stórsligna aðalroynd mánakvøldið boðar sangleikurin frá góðum, og ummæli av leikinum verður í komandi blaði**

SANGLEIKUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Tað eru bert atgongumerkir eftir til eykasýning leygardagin kl. 16.00 til »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mánakvøldið varð aðalroynd fyri fullum sali í Norðurlandahúsinum, tá amatørarnir úr Hoydølum framførdu »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«, men framførslan var úr enda í annan eyðkend av professionalismu á hægsta stigi, har tónleikur, ljós, palldesign, leiklist, dansur o.s.fr. gekk upp í eina hægri eind. Stórsligna aðalroyndin boðaði so avgjørt frá góðum, og gravgangurin eftir atgongumerkjum hevur noytt fyriskipararnar at hava eykasýningar. Les ummæli av leikinum í blaðnum í morgin.

**Fá atgongumerki eftir**

Gravgangurin eftir atgongumerkjum hevur verið sera stórur. Útselt varð til frumframførsluna týskvøldið, og sýningarnar hóskvøldið, fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið eru somuleiðis allar útseldar.

Tískil eru tvær eykasýningar leygardag og sunnudag klokkan 16, og harav eru bert fá atgongumerki eftir til eykasýningina leygardagin. So hevur onkur hug at fara, sum enn ikki hevur ognað sær atgongumerki til stórslignu framførsluna, er at skunda sær…

# Gunnar skrivar sangirnar sjálvur

TÓNLEIKUR
*pop.fo*



*Gunnar Mikkelsen er nú í ferð við upptøkurnar til nýggju útgávuna*

Gunnar Mikkelsen er í løtuni í upptøkuhølunum, har hann syngur sangirnar til nýggju útgávuna hjá sær. Hann hevur sjálvur skrivað allar sangirnar á fløguni.

Eftir at vinnarin av Stjørna í eitt kvøld hevði sungið fyri føroyingum um vikuskiftið, fór hann beinleiðis aftur til Danmarkar og í upptøkuhølini. Hesa vikuna skulu røddir leggjast á sangirnar, sum eru spældir inn.

Hóast tað hevur verið vanligt, at vinnarar av slíkum tónleikakappingum hava fingið onnur at skriva sangir til sín, so gongur Gunnar sína egnu leið. Hann hevur nevniliga skrivað allar sangirnar á útgávuni sjálvur.

– Eg segði fleiri ferðir við plátufelagið, at teir fingu tað besta burtur úr mær, um eg slapp at spæla mínar egnu sangir inn. Teir lurtaðu eftir sangunum, sum eg havi skrivað seinastu fýra árini, og teir hildu, at sangirnir vóru nóg góðir, greiðir Gunnar frá.

Ætlanin er, at nýggja útgávan hjá Gunnari Mikkelsen skal koma út um mánaðarskiftið apríl-mai, men longu nú er sangurin Haunted Honeymoon at hoyra í Danmark og í Føroyum.

# ítróttur

Nr. 48 • mikudagur • 10. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rumbul í Kyndli

**Hóast flaggskipið í løtuni er á odda í bestu mansdeildini, so tykist ónøgdin um venjarin vera somikið stór, at hesin væl kann vera sendur avstað, áðrenn komandi dystin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jan Djurhuus tykist í løtuni at sita sera ótryggur í venjarasessinum*

Nú tað bert resta fýra umfør í hondbóltslandskappingini hjá monnunum, er Kyndil tað liðið, sum liggur best fyri. Grøna havnarliðið er í løtuni tvey stig undan næstu kappingarneytunum, og tó at nógvir spennandi dystir eru eftir á skránni, so er Kyndil uttan iva liðið, sum hevur bestu kortini á hondini undan hesum. Ikki minst, tí liðið bara tvær ferðir skal spæla móti nøkrum av hinum oddaliðunum, meðan Neistin og VÍF hava tríggjar dystir av hesum slagnum.

**Eingin viðmerking**

Men tað eru skeinir undir glæstriligu tromini. Tí hóast oddastøðuna, so hevur innanhýsis stríð ígjøgnum eina tíð verið í Kyndilshópinum, og nú er líkt til, at hetta fer at hava broytingar við sær.

Broytingin, sum liggur í kortunum tykist fyrst og fremst vera tann, at venjarin, Jan Djurhuus ikki kemur at standa á odda fyri liðnum teir seinastu fýra dystirnar.

Sum skilst, so hava fleiri av leikarunum á liðnum sýnt stóra ónøgd við leiðsluna hjá venjaranum, og kanska er tað eisini so, at leikararnir við hesum vilja gera eina roynd at venda gongdini seinastu vikurnar.

Týsmorgunin var tó vónleyst at fáa nakra almenna viðmerking frá leiðsluni í Kyndli um málið.

Jóannes Dalsgarð, formaður í nevndini, sigur, at nevndin í løtuni einki hevur at siga um málið, og í aðrar mátar tykist ikki vera gjørligt at frætta nøkur tíðindi hesum viðvíkjandi, men tað er tó lítið at ivast í, at okkurt verður at frætta um hetta komandi dagarnar.

Næsti dysturin hjá Kyndli verður sunnudagin móti H71, og júst hesin dysturin man meira enn nakar annar minna tey í felagnum á nakrar óneyðugar stigamissir, sum hava havt við sær, at kappingin í ár er vorðin munandi meira spennandi, enn tey í Kyndli munnu brýggja seg um.

# Hálvfinalurnar avgreiddar

**Nú er greitt, hvørji tey 19 pørini eru, sum seinast í mánaðinum skulu kappast í FM-finaluni fyri pør**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Semifinalan fyri pør í Bridge, varð leikt í Bridgehúsinum í Havn leygardagin, 6. mars. 33 pør kappaðust um rættin at luttaka í finaluni, sum verður 28. mars í Havn. Leikt varð í tveimum røðum, har níggju pør frá hvørjum rað komu víðari til finaluna. Kappingin var væl fyriskipað og eiga fyrireikarinir rós uppiborið.

Kappingin var sera spennandi og jøvn. Eftir 60 spøl høvdu hesi pør tryggja sær luttøku í finaluni.

Magni Jøkladal - Allan Dal-Christiansen
Jógvan H. Andreasen - A. G. Nielsen
Salomon Johansen - Zakaris Joensen
Ingibjørg Hansen - Henriette Svenstrup
Kaj Alstrup - Høgni Hansen
Dia Petersen - Hans Egil Joensen
Eyðun Jensen - Niels Nielsen
Høgni Jacobsen - Finn Ougaard
Eyðun Joensen - Helgi Joensen
Eilif Petersen - Petur A. Johannesen
Dia Jacobsen - Marner Joensen
Per Kallsberg - Dánjal P. Mohr
Høgni Vesturklett - Gunnar Mouritsen
Johannes Skaarup - Jórun Johannesen
Petur S. Rasmussen - Hannis Jacobsen
Eyðun Jacobsen - Pól Joensen
Reimund Langgaard - Vilhelm Nygaard
Jóannes Mouritsen - Heðin Mouritsen
Rói Joensen - Jógvan Juul Rasmussen

**Tey bestu í hvørjum rað gjørdist:**
**Gult rað:**
1) Eilif Petersen - Petur A. Johannesen
2) Dia Jacobsen - Marner Joensen
3) Dia Jacobsen - Marner Joensen

**Hvítt rað:**
1) Magni Jøkladal - Allan Dal-Christiansen
2) Jógvan H. Andreasen - A. G. Nielsen
3) Salomon Johansen - Zakaris Joensen

**Endaspælið**

Komandi vikuskifti verður endaspælið í liðkappingini hjá FBS leikt í Klaksvík. Byrja verður fríggjakvøldi kl: 19:00.

**Spæl**

Spælið hesaferð er frá semifinaluni pør, ið varð hildin um vikuskifti. Spælið er eitt gott dømi um munin á parakapping og liðkapping.

E/-
(8
(DB10974
(9853
(104
(E62 (KDB753
(K2 (E653
(K1064 (DB
(ED52 (8
(1094
(8
(E72
(KB9763

| V | N | E | S |
| --- | --- | --- | --- |
| Símin | | Bogi | |
| | | 1sp | pas |
| 2ru | 2hj | pas | pas |
| Dbl¹) | pas | 3sp | pas |
| 4hj²) | pas | 5kl³) | pas |
| 6ut!! | a.p. | | |

[1]) Vísur góð kort, sigur einki um hjartara
[2]) Trelde, spyr eftir hjartara haldi og evt. essum
[3]) Vísur tvey ess og hjartara hald

Símin veit at makkarin hevur seks spar og 4 lit í hjart og sostatt hjartar ess, annars hevði eystan melda 2spar eftir 2hjart, vísandi 15-18 hp og seks lit í spar. Símin meldaði eftir hetta tann vinnandi 6ut. Megin-parturin av feltinum meldaði 6 spar, sum ikki er eins góður sum 6ut í parakapping.

## Holte sleppur í oddin

**Um vikuskiftið varð staðfest, at Holte skal spæla í elitudeildini komandi kappingarár**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast tað ikki hevur gingist so væl hjá Holte í ár, sum tað hevur gjørt undanfarnu árini, so verður føroyska útiesetaliðið aftur at síggja í donsku elitudeildini komandi kappingarár.

Hetta varð staðfest um vikuskiftið, tá Holte við Bárði B. Mikkelsen og Ragnari í Haraldsstovu hevði vitjan av ASV Århus. Gestirnir høvdu bert tvey stig undan hesum dystinum, og eftir ein tryggan 3-0 sigur til Holte, var hetta framvegis ikki broytt.

Enn resta tveir dystir í danska elitukvalifikatiónsspælinum, men saman við Hvidovre hevur Holte nú 14 stig, sum eru seks fleiri enn triðja liðið í bólkinum, og soleiðis eru tey vís í at vera við í ovastu deildini, tá eitt nýtt kappingarár byrjar í heyst.

Hjá hinum báðum »føroysku« feløgunum, Amager VK (Jóhann Nielsen) og PVC Lyng by (Steinar Eirikstoft og Suni Juul) gongst ikki heilt so væl.

Amager er næst niðast í sínum bólki, meðan Lyngby í sínum lagi er á triðja plássinum. Teir hava við einum dysti eftir bert tvey stig upp til næsta plássið, men vánaligi settmunurin ger, at teir kortini ikki hava møguleika at røkka hesum sessinum.

**Støðurnar í elitukval-røðunum:**
**Bólkur 1**

| Nr | Felag | Stig |
| --- | --- | --- |
| 1 | Holte IF | 14 |
| 2 | Hvidovre VK | 14 |
| 3 | Rosenlund Volley | 8 |
| 4 | Bedsted KFUM | 8 |
| 5 | Amager VK | 4 |
| 6 | ASV Århus | 2 |

**Bólkur 2**

| | | |
| --- | --- | --- |
| 1 | Lyngby Volley | 16 |
| 2 | Spentrup IF | 14 |
| 3 | PVC Lyngby | 12 |
| 4 | Grøndal EV | 6 |
| 5 | Aarhus 1900 | 4 |
| 6 | Starup Ågård | 0 |